# Dragin fingið siglingarloyvi

**Týsdagin 1. juli fekk skúlaskipið Dragin endaliga siglingarloyvið, og fyrstu uppgávurnar hjá skipinum verða útferðartúrir í sambandi við Nordvesten, sum er í Klaksvík og Fuglafirði**

SKÚLASKIP
*Solby A. Eliasen*



*Nú hevur Dragin fingið endaligu siglingarloyvini, og hann fer sínar fyrstu útferðartúrar nú, meðan Nordvesten stevnan er*

*Mynd: Jens K. Vang*

**Klaksvík:** Tíggju ára arbeiði er liðugt. Dragin liggur púra liðugur við kei í Klaksvík. Hann skal nýtast til útferðir frá nú og til skúlin byrjar aftur í august. Tá fer hann so at standa sínar fyrstu royndir sum skúlaskip.

Hans Eli Hansen, formaður í stuðlafelagnum Dragin, er ein sera fegin maður í dag. Í mong ár nú hevur hann glett seg til henda dagin, tá skipið endiliga fekk loyvini og kann setast í brúk.

– Nú vóni eg bara, at øll fara at fáa gleði av skipinum. Tað hevur verið sera stuttligt og spennandi, men nú er tíðin komin til, at skipið skal nýtast til tað endamál, tað er ætlað, sigur Hans Eli.

Fyri tíggju árum síðani setti Hans Eli seg í samband við fleiri aðrar mans, og saman hava teir staðið fyri øllum arbeiðinum við at gera Dragan siglingarkláran.

– Hetta er eitt gott dømi uppá, hvat kann koma burturúr, tá menn samstarva, sigur Hans Eli Hansen.

Tað, sum er so serstakt við Draganum, at hetta er alt sjálvboðið arbeiði. Tað vil siga, at menn hava nýtt teirra frítíð til at arbeiða umborð. Og nú Dragin er siglingarklárur er heldur ongin skuld at dragast við.

Hans Eli sigur, at heldur lata arbeiðið taka ta tíð, tað hevur tikið og koma væl og virðiliga undan tí, enn at gera alt skjótt og kanska standa við eini skuld, sum skipið so ikki megnar at rinda aftur.

Dragin verður sum sagt nú fyrst nýttur til útferðir. Og stovnar, virkir, feløg ella einstaklingar – øll kunnu leiga Dragan til eina útferð. Og so tá skúlin er byrjaður aftur, tá vónar Hans Eli eisini, at skúlar kring landið fara at gera nýtslu av einasta skúlaskipinum í Føroyum í dag.

Tey, ið hava hug at leiga Dragan, kunnu seta seg í samband við Hans Eli Hansen á tlf. 456661.

Hans Eli leggur dent á, at tað hava verið nógvir mans um hetta arbeiðið.

– Tað verður altíð tosað við meg, men vit hava verið fleiri um hetta arbeiðið, sigur hann at enda.

Teir, ið hava verið mest við í arbeiðinum við Draganum eru:

Poli Mikkelsen, stjóri á Klaksvíkar Sjómansskúla
Eyðun Joensen, smiður
Martin Olsen, bedingsmeistari
Símun Johansen, timburmaður
Hans Olaf Hansen, tannlækni
Dorius Frederiksberg, kokkur
Kristin Rasmussen, verkfrøðingur
Fischer Johannesen, tollari
Hans Eli Hansen, lærari

Og so hava aðrir veitt eina hjálpandi hond eisini.

Heini Heinesen, maskinmaður og alt el-arbeiði hava Páll Mortensen, Áki Justinussen, Jákup Eydnugarð og Bogi Simonsen gjørt.

# Oljudálking á Trongisvágsfirði

**Týsdagin var ein at síggja til stórur oljuplettur at síggja á Trongisvágsfirði. Pletturin var við norðara landinum, men talan er ikki um nakað óhapp, sum var orsøk til dálkingina**

DÁLKING
*Solby A. Eliasen*

Frá Havnaskrivstovuni á Tvøroyri verður sagt, at talan bert var um olju, sum savnar seg saman, tá veðrið er gott. Og tískil verður ongin kanning gjørd av dálkingini. Tað gekk væl at fáa oljuna uppaftur.

At síggja til sá pletturin út til at vera rættuliga stórur, men av Havnaskrivstovuni verður sagt, at tílíkt ofta kann síggja nógv størri út, enn tað í veruleikanum er.

Sperrur vórðu tó lagdar út, tí stutt harfrá liggja aliringar. Men har var ongantíð vandi á ferð við teimum, tí at ættin skifti stutt eftir, og so rak oljan inneftir aftur, verður sagt frá havnaskrivstovuni á Tvøroyri.



*Tað gekk bæði skjótt og væl at fáa oljuna burtur, sum lá á Trongisvágsfirði týsdagin*

*Mynd: Áki Bertholdsen*








# Ongin avgerð um dýping við Tinganes fyrrenn í heyst

**Tað verður í fyrsta lagi í oktober mánað, at Tórshavnar Býráð fær at vita um tað sleppur at dýpa framvið Tinganesi, so at nýggi Smyril kann fáa atløgupláss á Bursatanga**

SUÐUROYAR-SIGLINGIN:
*Áki Bertholdsen*



*Tað ganga minst tríggjar mánaðir, áðrenn Høgni Hoydal fer at taka støðu til, um Tórshavnar Býráð skal sleppa at dýpa framvið Tinganesi*

Tað verður ikki enn á sinni, at Høgni Hoydal fer at taka støðu til ætlanina hjá Tórshavnar Býráð at spreingja og dýpa framvið Tinganesi fyri at gera atløgupláss til nýggja Smyril, tá ið hann kemur í oktober næsta ár.

Landsstýrismaðurin í mentamálum, sigur, at hann fer nú at biðja allar partar í málinum siga sína hugsan um málið, áðrenn hann tekur endaliga støðu.

Ætlanin hjá Tórshavnar Býráði er at gera nýggja Smyrli atløgupláss á Bursatanga, undir liðini á Norrønu. Norrøna skal so liggja í krókinum, har hon liggur nú og Smyril skal hava sítt atløgupláss beint uttan á.

Men skal tað lata seg gera, er tað neyðugt at dýpa framvið Tinganesi tí Smyril er so stórur.

Men tað er ikki sum at siga tað, tí nú hevur Fornminnisfelagið mælt landsstýrismanninum í mentamálum til at økisfriða Tinganes heilt út á 10 metra dýpdarlinjuna.

Tað ljóðaði, at Høgni Hoydal skuldi taka støðu til málið í síðstu viku. Men tað verður so av ongum, tí hann sigur, at hann ætlar at hugsa seg væl um, áðrenn hann tekur eina støðu.

Og fyri at hava eitt so haldgott grundarlag at taka støðu út frá sum gjørligt, fer hann tískil nú at senda málið til hoyringar hjá øllum pørtum, sum vara av tí.

– Hoyringarfreistin er tríggjar mánaðir og fyrrenn tann freistin er farin og partarnir í málinum hava sagt sína hugsan, verður ongin støða tikin í málinum.

Sostatt verður endaligur úrskurður ikki tikin, fyrrenn um tríggjar mánaðir.

### Fer at viga fyri og ímóti

Høgni Hoydal sigur, at hann fer at lurta eftir teimum fakligu grundgevingunum fyri at friða Tinganes út á 10 metra dýpdarlinjuna.

Men hann fer eisini at taka hini atlitini í málinum við í metingina, eitt nú sjónarmiðini hjá Tórshavnar Kommunu. Og tá ið hann hevur fingið útgreinandi sjónarmiðini frá øllum pørtum, fer hann at viga fyri og ímóti og at taka eina støðu eftir tí.

Landsstýrismaðurin sigur, at Tinganes er av okkara allar fremstu fornminnum og tað rúmar bæði okkara politisku søgu, okkara byggisøgu, handilssøgu, umsitingarligu søgu og kirkjusøgu og tí umfatar tað stutt sagt ein stóran part av allari okkara samfelagssøgu.

– Men Tinganes er eisini eitt livandi fornminni, leggur hann afturat.

– Tí er tað merkisvert, at spurningurin um at friða Tinganes ikki hevur tikið seg upp fyrr. Nú er málið so á borðinum og støða verður tikin til tað. Men tað skal farast fram eftir bókini so at vit fáa eina so væl undirbygda avgerð sum gjørligt, sigur hann.

Hann sigur, at tað er ongin ivi um, at Tinganes skal varðveitast.

– Tað, sum ivi kann vera um, er, hvørja ávirkan tað fer at fáa á Tinganes, at dýpd verður framvið Tinganesi og at atløgupláss verður gjørt so tætt við. Eitt nú er tað nevnt, at tað ber ikki til at tryggja seg ímóti, at spreingingar á botni ikki fara at føra til rivur í helluna omaná sjónum.

– Men tað er alt hetta, sum ætlanin er, at hoyringin skal geva okkum svar uppá og fyrrenn tá, ber ikki til at taka støðu, sigur Høgni Hoydal.

# Jan Christiansen skilir framvegis onki

**Hann skilir framvegis ikki, hví Tinganes skal friðast út á 10 metra dýbdarlinjuna, tí tað kann verða ein stór forðing fyri útbyggingum í Tórshavnar Havn. Og hvat verður av nýggja Smyrli, veit hann ikki**

TINGANES
*Áki Bertholdsen*



*– Tað verður vanærilig skomm at koma við nýggjum Smyrli í oktober næsta ár og so ikki fáa lagt tað at nakrastaðni, sigur Jan Christiansen.*

– Eg skilji hetta framvegis ikki. Men hetta kann gerast ein stórur trupulleiki og tí mugu vit sessast at tosa um viðurskiftini.

Jan Christiansen, borgarstjóri í Havn, er ikki samdur við tilmælið frá forminnisnevndini um at friða Tinganes heilt út á 10 metra dýbdarlinjuna.

– Hevði hon mælt til at friða Tinganen 10 metrar úr landi, kundi eg skilt tað. Men verður Tinganes friða heilt út á 10 metra dýbdarlinjuna, fer tað at elva til stórar trupulleikar hjá Tórshavnar Havn, tí tann linjan røkkur heilt yvir á bryggjukantin, har skipini leggja at.

– Var tann friðingin komin fyrr, høvdu vit ikki sloppið at gjørt atløgupláss til nýggju Norrønu, tí tað økið hevði verið friðað, sigur borgarstjórin.

– Tað verður eisini avmarkað, hvat vit kunnu gera av hvat vit kunnu byggja út í Tórshavnar Havn hereftir.

Eftir yvirlitinum hjá Landsverkfrøðinginum yvir havnir, er tað bara framvið sjálvum høvuðsmolanum, at Tórshavnar Havn er 10 metrar djúp, alla aðrastaðni er hon grynri.

Jan Christiansen sigur, at hetta er heilt órímuligt og hann skilir framvegis ikki tilmælið frá Fornminnisnevndini.

– Eftir tilmælinum frá Fornminnanevndini kunnu vit gera eini háhús á sjálvum bryggjukantimum, men beint niðurvið fáa vit ikki dýpd, ella lagt nýggjar fendarar, ella styrkt bryggjukantin, ella gjørt nakað sum helst, uttan at fáa loyvi frá friðingarmyndugleikun um. Tað er heilt órímiligt og gevur eina ómetaliga tunga arbeiðsgongd, sigur Jan Chistiansen.

### Smyril sleppur ikki at

Býráðið verður ein av pørtunum, sum verður hoyrdur í málinum, nú landsstýrismaðurin skal taka støðu til, um Tinganes skal friðast út á 10 metrar, ella um Tórshavnar Býráð skal sleppa at dýpa framvið, eins og vit hava greitt frá omanfyri.

– Tá fara vit at greiða nærri frá okkara ætlanum og hvussu vit tryggja, at hellan ikki fær skaða av spreingingum, sigur hann.

– Tí mugu vit finna eina loysn sum allir partar kunnu liva við, tí tað ber heldur ikki til at steðga allari útbygging.

Hann sigur at tað skal ongin ivi vera um, at útgangsstøðið hjá øllum pørtum er tað sama, tí eisini Tórshavnar Býráð leggur stóran dent á at varðveita Tinganes og alt Reynið og hevur brúkt nógvan pening upp á tað endamálið.

Jan Christiansen sigur, at Bursatangi er einasta atløgupláss, sum Tórshavnar Havn hevur at bjóða nýggja Smyrli.

– Men sleppa vit ikki at dýpa, sleppur Smyril heldur ikki at liggja har og sleppur sostatt ikki at leggja at har, tá ið Norrøna er her eisini, so einfalt er tað. Hetta verður ein trupulleiki mánamorgun, mikudag seinnapart og fríggjamorgun, tá ið bæði Norrøna og Smyril eru á Havnini ísenn.

– Smyril kann ikki liggja undir Skipafelagnum, tí har er ov grunt og annars verður tað eitt altjóða krav, at ferðafólk og farmur skulu vera hvør sær og hvar hann so skal liggja, veit eg ikki.

– Og tað er púra greitt, at Smyril verður ikki tikin framum onnur skip, sum plaga at liggja at í Havn, eitt nú Smyril, farmaskipini hjá Skipafelagnum og Eimskip og onnur skip, tí tá ið tey skipini skulu liggja at, má Smyril víkja.

Hann sigur eisini, at hóast Tórshavnar Havn fær loyvi at dýpa framvið Tinganesi í oktober, er tíðin so knøpp, at hann veit ikki um tað eydnast at gera ferjuleguna til Smyril til skipið kemur.

– Tað verður vanærilig skomm at koma við nýggjum skipi í oktober næsta ár og so ikki fáa lagt tað at nakrastaðni, sigur Jan Christiansen.